

# Dýrt at bora turran brunn

Jan Müller

20.03.2014 - 19:16

Oljan.fo

Bretska oljufelagið Ophir Energy boðar í dag frá, at tað fekk einki burtur úr einari boring við vesturafrikanska landið Gabon, tí tað var ikki fíggjarligt grundarlag fyri at gera meiri burtur úr boringini.

Men tað er ikki bara sjálv boringin, sum kostar Ophir Energy, tí tað vánaliga úrslitið í Gabon sást alt fyri eitt aftur á virðisbrævamarknaðinum, har virðið á partabrøvum í felagnum fall nógv.

Fyrrapartin fall partabrævavirðið hjá Ophir Energy á meiri enn 18 prosent á marknaðinum í London, og so nógv eru partabrøv felagsins ikki fallin í hálvt triðja ár.

Tað stóra fallið ger, at Ophir Energy er tað felag, sum er fallið mest í virði á tí evropeiska Stoxx 600-vísitalinum.